UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **16. august 2022**
Tygara ref.: **52-007/2022**
Máltal.: **21/08502-138**

Svar

upp á

§ 52a fyrispurning nr. 52-007/2022 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum, um Lands- og PISAroyndir í fólkaskúlanum

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvat er kostnaðurin av at hava lands- og PISAroyndir í fólkaskúlanum?
2. Hvussu verða úrslitini av royndunum brúkt?
3. Metir landsstýrismaðurin, at úrslitini av lands- og PISAroyndunum verða brúkt til frama fyri næmingin?
4. Hvørjar afturmeldingar hava starvsfólkini, sum virka í skúlunum, givið um lands- og PISAroyndirnar?
5. Hvørjar eru ætlanirnar við lands- og PISAroyndunum í framtíðini?

Svar

Til 1: Kostnaðurin seinastu árini hevur verið:

	2018	**2019**	**2020**	**2021**	**2022**
Pisa	362	789	180	189	600 (369)
Landsroynd	0	338	324	280	381 (223)

í túsund kr.

Tølini fyri 2022 eru ikki roknskapartøl, men fíggjarætlanartøl. Í klombrum eru roknskapartøl pr. 11. august 2022.

Til 2:

Yvirskipaða endamálið við at luttaka í PISA royndum og at skipa landsroyndir er at menna føroyska fólkaskúlan. Kanningarnar eru ymiskar m.a. við at PISAroyndir eru til 9. floks næmingar triðja hvørt ár, meðan landsroyndir hvørt ár eru í 4. og 6. flokki.

PISA kanningin er ein meting av støðinum í landinum sum heild og samanborið verður við onnur lond, meðan landsroyndirnar kanna, hvussu einstaki næmingurin klárar seg í mun til settu førleikamálini í ávísum lærugreinum. Í PISA kanningini er sjálv føroyska skúlaskipanin í fokus, meðan landsroyndarúrslitið skal geva Mentamálaráðnum innlit í fakliga støðið í ávísum lærugreinum í øllum fólkaskúlum, grundað á einsháttaðar uppgávur.

Harumframt skal úrslitið frá landsroyndunum nýtast av einstaka skúlanum sum partur av støðugu eftirmetingini av úrtøkuni hjá einstaka næminginum í avvarðandi lærugrein til frama fyri framatlýtandi læring og menning hjá einstaka næmingunum og hjá flokkunum sum heild.

Í báðum førum verða frágreiðingar skrivaðar, og úrslitini hava seinastu árini millum annað verið brúkt í samband við:
PISA:

- Frágreiðing verður skrivað við tilmælum
- Skjal til UMMR og politisku skipanina at eftirmeta fólkaskúlan
- Førleikamenning av uppgávunevndum
    - Fráfaringarroynd og landsroynd
    - Menning av prótøkuuppgávum, soleiðis at øll torleikastigini eru umboðaði
- Kunning úti í skúlunum á økisfundum
- Trivnaðarkanning/happing (Námsvísindadeildin)
- Kanning av lesiførleikum hjá næmingum frá 2009 til 2018 (Nám)

Landsroyndirnar:

- Frágreiðing verður skrivað við royndarúrslitum, miðalúrslit fyri landið, úrslit fyri besta og lækasta skúla (ikki navngivnir skúlar).
- Foreldur og næmingar skulu verða kunnað um úrslitini í landsroyndum. Mentamálaráðið (Prógvstovan) sendir einstøku skúlunum úrslitini hjá teirra næmingum.
- Skúlaleiðarin viðger úrslitini frá landsroyndini saman við einstøku lærarunum, og løgd verður ein ætlan fyri, hvussu neyðugar ábøtur skulu fremjast.
- Skúlaleiðarin skal í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at skúlin hevur fingið royndarúrslitini, senda Mentamálaráðnum eina frágreiðing um, hvørji tiltøk og ætlanir úrslitini í landsroyndini hava elvt til.

Týdningarmikið er at gera vart við, at landsroyndarúrslitið ikki vísir heildarúrtøkuna hjá næmingunum. Tí skal úrslitið í landsroyndini ikki standa einsamalt, men skal skiljast sum eitt ískoyti til regluligu eftirmetingina hjá skúlanum av úrtøkuni hjá hvørjum einstøkum næmingi í dagligu undirvísingini í avvarðandi lærugrein.

Til 3: Nógv menning er farin fram í fólkaskúlanum síðani fyrstu PISA kanningina í 2006. Hetta er í ávísan mun orsakað av tilmælum frá PISA-frágreiðingunum. Átøk hava verið framd bæði innan lesiføri, støddfrøði og náttúruvísindi. Innan lærugreinina føroyskt er m.a. tímatalið økt í

yngstu flokkunum, eisini er ein útbúgving av lesivegleiðarum ment, størri fokus er sett á orðblindni og vælgrundaðar lesikanningar til teir yngstu flokkarnar eru gjørdar. Hetta hevur havt eina góða ávirkan á veikasta lesibólkin. Í øllum førum sæst tað aftur í PISA-úrslitinum fyri lesiføri í 2018, at næstan eingin næmingur er á lægsta stignum, og hetta hevur eisini ávirkað úrslitið bæði innan náttúruvísindi og innan støddfrøði.

PISA kanningin gevur ikki nakra afturmelding til næmingin, tí kanningin hevur til endamáls at samanbera skúlaskipanir í OECD limalondunum. Úrslitini av PISA vera tí nýtt á myndugleikastigi til at áseta tiltøk, ið skulu gagna næminginum í tí føroyska fólkaskúlanum.

Landsroynd:
Samsvarandi endamálinum og fólkaskúlalógini áliggur tað skúlaleiðaranum at viðgera úrslitini frá landsroyndini saman við einstøku lærarunum og leggja eina ætlan fyri, hvussu neyðugar ábøtur skulu fremjast. Tað áliggur tí einstaka skúlanum at viðgera úrslitini av landsroyndini. Hvussu hetta verður gjørt á einstaka skúlanum er ikki eftirkannað av myndugleikanum.

Til 4: Tað hevur ikki verið gjørd nøkur skipað eftirmeting av, hvat starvsfólk sum virka í skúlunum halda um landsroyndir og PISA kanningar.

Til 5: Framyvir er ætlanin framhaldandi at brúka úrslitini frá kanningunum til at menna og betra um skúlan og læring, og her er tað sera týdningarmikið at hava fyri eyga, at høvuðsfokus júst má verða á, hvussu vit framatlýtandi brúka úrslitini til støðugt at menna undirvísingina og harvið læruúrtøkuna í skúlanum. Tí kann tað verða skilagott framyvir at hava landsroyndirnar í byrjanini av hvørjum skúlaári, soleiðis at lærararnir framatrætta kunnu brúka úrslitini í síni fyrireiking og skipan av undirvísingini. Í sambandi við úrslitini frá landsroyndunum er ætlanin at seta meira orku av til at veita vegleiðing og ráðgeving til teir skúlar, sum ikki hava nøktandi úrslit í landsroyndunum.
Í 2020 setti Prógvstovan sjótul á eina førleikamenning av uppgávunevndunum, sum gera uppgávur bæði til landsroyndir og fráfaringarroyndir fólkaskúlans. Endamálið er at menna uppgávurnar og spurningarnar, soleiðis at dentur verður lagdur á øll torleikastigini, og ætlanin er at halda áfram við hesum arbeiði. Uppgávurnar í landsroyndunum kunnu mennast, soleiðis at tær betri kunnu samanberast ár fyri ár, sum kann geva skúlaleiðslum og skúlamyndugleikum innlit í gongdina í eitt nú støddfrøði og lesiførleika ár undan ári. Eisini er framhaldandi ætlanin at menna samskiftið millum Prógvstovuna og skúlarnar í mun til PISA- og landsroyndirnar.

PISA kanningarnar veita nógv data um bakstøði næminganna, og í mong ár hevur ætlanin verið at granska meira í hesum. Men fyri at hetta kann bera til, má tað raðfestast, bæði við fígging og starvsfólki.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður